

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 01 - 2012

# 300 útlendskar oljuháinntøkur skattast í Føroyum í 2012

Oljufelagið Statoil stendur fyri tí størstu føroysku íløguni í 2012 og helst eisini tí størstu einstøku føroysku íløguni nakrantíð. Fyrru hálvu Tað verður í fyrru hálvu av 2012, at Statoil fer at bora áttanda brunnin á Føroyaøkinum. Tað verður hildið, at henda verkætlanin fer at kosta eina milliard krónur. Tá er so ikki tikin hædd fyri øðrum kostnaðum, sum eru brúktir uppá sama loyvið. Henda íløgan fer eisini at kasta nógv av sær til føroyska samfelagið. Umframt at allar vørur og tænastur skulu um føroyskan keikant ella flogvøll, so skulu eisini allir útlendingar, sum verða tilknýttir verkætlanini gjalda skatt í Føroyum. Arbeiðsloyvi til 300 fólk Rúni M. Hansen, stjóri í Statoil væntar, at tey fara at søkja um arbeiðsloyvi til umleið 300 persónar. Meginparturin av hesum eru fólk, sum fara at arbeiða umborð á boripallinum. Hesi fólk koma at gjalda skatt í Føroyum, so væntast kunnu eyka skattainntøkur til føroyska samfelagið uppá fleiri milliónir. Umframt hetta kemur lógin um, at allar vørur og tænastur fyrst skulu flytast til Føroyar og víðari út á pallin, eisini at merkja nógv eyka virksemi og harvið eyka inntøkur, sum koma føroyska samfelagnum til góðar. Stór verkætlan í altjóða høpi Hóast oljustjórin ikki vil gera alt ov nógv burtur úr komandi boringini, so viðgongur hann, at hetta er ein av teimum stóru leitiverkætlanunum í altjóða oljuhøpi. Økið er avbjóðandi, og sum oljan.fo skilur, so verður borað sera djúpt hesaferð, og tað kostar bæði pening og tíð. Tí verður vætnað, at boringin fer at taka millum 4 og 5 mánaðir. Enn er ikki endaliga avgjørt, nær byrjað verður, uttan tað, at tað verður í fyrru hálvu í 2012.